## Kjakkvøld á REX í annaðkvøld

Fríggjakvøldið skipar MFS fyri árligu lestrarstevnuni á REX í Havn. Á skránni verður politiskt kjak, undirhald, tónleikur og ábit. Tiltakið er ókeypis. Umboð úr samgonguni og andstøðuni fara at kjakast um førda útbúgvingarpolitikkin í Føroyum. Undan kjakinum kunna lesandi úr Norðuratlantsbólkinum um sínar kanningar millum føroyskar útisetar í Danmark. Sum støðan er, eru mong ið fara úr Føroyum í lestrarørindum uttan at koma heimaftur. Spurt verður hvørjar orsøkirnar eru til hesa gongd og um nóg mikið verður gjørt fyri at venda gongdini. Politisku umboðini fara at geva síni boð og høvi verður hjá fólki at seta spurningar og siga sína hjartans hugsan um evnið. Millum politisku umboðini vera eitt nú Sjúrður Skaale, Magni Laksafoss og Eygun Samuelsen. Jákup Veyhe fer at undirhalda, og Finnur Jensen fer at spæla. Ókeypis ábit og okkurt leskandi verður til øll sum koma, sigur MFS.

## Fartelefonin vandamikil



Pittsburgh Cancer Institute, sum er ein viðurkendur stovnur innan krabbameinsgransking í USA, hevur nú ávarað síni starvsfólk og lesandi ímóti at brúka fartelefonina meiri enn neyðugt, tí tað kann økja vandan fyri, at tey kunnu fáa krabbamein. Ávaringin hevur vakt stóran ans, tí umfatandi kanningar í USA, Fraklandi og Noregi eru komnar til ta niðurstøðu, at tað kann ikki prógvast, at fartelefonin økir vandan fyri krabbameini, sigur danska kringvarpið DR.

# Gerhard væl á veg úr samgonguni

**Gerhard Lognberg sigur, at hann fer at boða løgmanni frá, hvørt hann er partur av samgonguni ella ei, áðrenn ólavsøku. Men hann metir tað vera ógvuliga lítið sannlíkt, at hann verður. – Tað sær ikki út til, at eg upp á nakran máta fari at góðtaka hetta her, sigur sandoyartingmaður**

POLITIKKUR
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

Klokkan trý í gjár var freistin hjá løgmanni, Jóannesi Eidesgaard, at svara floksfelaga sínum, Gerhardi Lognberg. »Um byrjað verður at bora fyri Sandoyartunlinum í november-desember 2010, og hetta verður samtykt við lóg, so eri eg framvegis partur av samgonguni«, slerdi Gerhard Lognberg fast í skrivinum til løgmann. Og klokkan var farin lítið av trý, tá ein mailur lá í mailboksini hjá Gerhardi Lognberg. Løgmaður hevði svarað, men Gerhard Lognberg dámdi lítið tað, ið har stóð. Tí hóast krav, so vóru eingi lyfti frá løgmanni um nakað sum helst. Rás2 hevði Gerhard Lognberg í telefonini seinnapartin í gjár og spurdi, hvat Gerhard Lognberg gjørdi við tað?

– Tað skal eg koma aftur til, tí her er einki sum bendir á nakað sum helst, segði avgjørdi sandoyartinglimur hjá Javnaðarflokkinum.

Hann heldur ikki, at skrivið frá løgmanni tryggjar honum ella Sandoynni tað stóra.

– Tað einasta hetta skjalið, eg havi fingið, tryggjar okkum í Sandoynni er, at vit skulu avtaka lógina um sandoyartunnilin, metir Gerhard Lognberg.

Vísandi til skriv sítt til løgmann, varð Gerhard Lognberg spurdur, hvat hann nú gjørdi.

– Tað fari eg at boða løgmanni frá áðrenn ólavsøku. Men tað sær ikki út til, at eg upp á nakran máta fari at góðtaka hetta her, segði hann og legði aftrat, at við tí havandi í huga, so fer tað neyvan at líkjast tí, at Gerhard Lognberg framhaldandi verður partur av samgonguni.

– Tað er ógvuliga lítið sannlíkt, men eg skal boða løgmanni frá, hvussu verður við tí, sigur Gerhard Lognberg við Rás2.

### Vil at satsa samgonguna

Grundgevingar fyri útsøgnum sínum grundar Gerhard Lognberg á uppáhaldið um, at Jóannes Eidesgaard ikki gevur nakað lyfti, hóast tað var kravið hjá Gerhardi í skrivinum til løgmann.

– Í ongan máta gongur hann mær á møti í hesum skrivinum. Tvørtur ímóti vísir hann øllum tí aftur, sum eg spurdi hann um. Og hann sigur nokkso greitt, at skálafjarðatunnilin verður tann fyrri, segði avgjørdi Gerhard Lognberg.

Hann er av teirri sannføring, at sjálvandi skal tað lógarfestast, nær byrjað verður upp á sandoyartunnilin. Men tað ynskir løgmaður ikki at gera.

Verður áðrenn ólavsøku at Gerhard boðar frá.

– Eg vil siga tað, at samgongan hevur slept øllum suðurøkinum í Føroyum upp á fjall. Tað eru einassta øki í landinum, sum gongur aftur í fólkatali og tað vil man ikki taka atlit til og bara letur koyra, metti Gerhard Lognberg, sum síðani varð spurdur, um hann var til reiðar at seta samgonguna upp á spæl til frama fyri Sandoyartunnilin?

– Ja, sjálvandi eri eg tað, staðfesti Gerhard Lognberg.



*– Eg vil siga tað, at samgongan hevur slept øllum suðurøkinum í Føroyum upp á fjall, sigur Gerhard Lognberg*

## Svar løgmans til Gerhard

Góði Gerhard,

Fyrst er at siga, at mær hevði dámað best, um vit kundu umrøtt hetta týdningarmikla og viðbrekna mál okkara millum, heldur enn skrivliga í fjølmiðlunum. Men lat tað fara.

Eg vendi mær til tín seinasta fríggjadag fyri at vita, hvussu støða tín er í samgonguni, nú tú ivast í tunnilssemjuni. Svarið fekk eg í brævi, endurgivið í fjølmiðlunum, har tú setir mær tveir spurningar, ið tú vilt hava svaraðar innan 23. juli kl. 15.00.

Tíverri fái eg ikki grundað svar mítt á niðurstøður í samgonguni, tí vegna summarfrí verður samgongufundur um m.a. tunnilsmálið ikki fyrr enn týsdagin 24. juli.

Hinvegin havi eg viðgjørt málið í lítlu samgongu, har eisini tvey umboð fyri tunnilsnevndina vóru við, eftir at eg hevði fingið nágreinað, hvussu tunnilssemjan skal skiljast frá formanninum í tunnilsnevndini Bjørt Samuelsen, landsstýriskvinnu. Harafturat havi eg umrøtt støðuna við starvsnevndina í Javnaðarflokkinum umframt tingbólkin og landsstýrisumboð floksins. Tíverri møtti tú ikki á hesum fundi.

Starvsnevndin gjørdi av at kalla Sandoyar Sýslu Javnaðarfelag til fundar um málið. Tíverri gav felagið avboð.

***

Fyrri spurningur var, um byrjað verður at bora í nov/des 2010, og um so verður, um hetta verður samtykt við lóg.

Tunnilsnevndin mælir til, at 50 mió. kr. verða settar á fíggjarlógirnar fyri 2009, 2010, 2011 og 2012 til partafelagið Sandoyartunnilin. Partafelagið verður stovnsett við stovnsfæi í hesari ólavsøkutingsetuni. Somuleiðis verður nýggj verklagslóg um Sandoyartunnilin løgd fram í hesari tingsetuni, har staðfest verður, at tá eginognin í felagnum er 150 mió. kr. verður farið undir verkætlanina. Nevndin metir, at hetta er eftir fíggjarlógina fyri 2011.

Tað verður sostatt ikki lógarfest at byrjað verður at bora í nov/des 2010, men farið verður undir verkætlanina, tá eginognin er komin uppá í minsta lagi 150 mió. kr.

Í hvønn mun tilgongdin fer at samsvara fult og heilt við tunnilssemjuna er sjálvsagt treytað av búskapargongdini í samfelagnum.

Eg vísi í hesum sambandi til orðingina á fyrstu síðu í okkara samgonguskjali, har sagt verður: "Politisku átøkini, sum samgonguskjalið nevnir, eru øll bundin at fíggjar- og búskaparstøðuni." Henda orðing skal skiljast soleiðis, at kemur veruligur stígur í búskapin, so vita vit av royndum, at neyðugt verður at raðfesta neyvari. Vit vera altíð noydd at reka okkara samfelag á einum búskaparligum forsvarligum støði. Tí kann ein ávísur dagur at byrja ikki tryggjast í løggávu.

Viðmerkjast skal, at hvørki í løgtingslóg um fast samband um Vestmannasund ella í løgtingslóg um fast samband um Leirvíksfjørð er ávísur dagur ásettur, nær arbeiðini byrja.

Til seinna spurningin um, hvør tunnil fyrst verður gjørdur Skálafjarðartunnilin ella Sandoyartunnilin, hevur nevndin ikki gjørt greiða niðurstøðu. Nevndin staðfestir, at tað má vera atlitini til fíggjarliga og tøkniliga váðan, ið eru avgerandi fyri, hvør tunnil verður gjørdur fyrst.

Úr einum fíggjarligum sjónarhorni er skilabest at gera Skálafjarðartunnilin fyrst, tí henda íløgan fíggjar seg sjálva. Harafturat fer henda íløga at kasta somikið av peningi av sær sum frálíður, at landskassin kann nýta vinningsbýtið til at fíggja aðrar íløgur eitt nú Sandoyartunnilin.

Sostatt bendir mangt á, at Skálafjarðartunnilin verður hin fyrri.

Hetta útihýsir tó ikki, at tøknilig viðurskifti kunnu hava við sær, at hetta ikki heldur. Men tað ber ikki til at siga nakað um í løtuni.

Undir øllum umstøðum kann sigast, at báðar verkætlanir ikki byrja samstundis, men helst kunnu umskarast.

Samanumtikið haldi eg, at hetta er tað mest ítøkiliga, ið higartil er fingið til vega um at gera Sandoyartunnilin til veruleika. Omanfyri nevnda verklagslóg er eitt stórt stig á leiðini og besta trygdin, ið kann gevast nú, sum búskaparliga og politiska útlitini eru í løtuni.

Vísandi til, at tú áður hevur sagt, at verkætlanin um fast samband um Skopunarfjørð kann ávirka tína støðu til samgonguna, heiti eg á teg um at siga mær, um tú framhaldandi er partur av samgonguni. Eg vænti mær svar fyri ólavsøku.

Vinalig heilsan

Jóannes Eidesgaard,
løgmaður